*Men konufólk hugsa eisini, "nei, eg veit einki um fiskivinnu í Barentshavinum, so eg kann ikki fara uppí politikk"*
*Annita*

## Annita á Fríðriksmørk

Kemur ikki frá einum heimi, har politikkur var evnið við døgverðaborðið. Foreldrini vóru ikki tjóðveldisfólk. Hon var 19 ár, tá hon gjørdist limur í Unga Tjóðveldinum, og 25 ár tá hon kom inn í starvsnevnina. Eftir 10 ár í organisatiónini, kom hon inn á Ting í 1998. Áðrenn tað stillaði hon upp til fólkatingsval tvær ferðir. Sitið sum landsstýriskvinna við mentamálum. Eisini verið bygdaráðslimur á Strondum.



# ur tú ongan kjans



## Politikkur er kalt umhvørvi

*Hvussu er politiska spælið handan leiktjøldini ?*

*Annita:* Politikkur snýr seg um vald, so har eru nógvir albogar. Og skalt tú vera við, mást tú spæla við teimum reglum, sum eru, og fáa spískar albogar beinanvegin. Tað er hart, tí knappliga verður tú niðurgjørd av fólki, sum tú ikki hevði væntað tað av. Tað er eitt kalt umhvørvi.

*Lisbeth:* Í hinum flokkunum veist tú, at tú hevur mótstøðufólk. Men tað ringasta er, tá tíni egnu ganga ímóti tær. Tað er óbehagiligt. Men tað ein spurningur um makt, og eg eri ikki drigin upp við at skula brúka albogar, tí hevur tað til tíðir verið ringt.

*Heidi:* Eg havi altíð kempað fyri tí, sum eg havi trúð uppá, so tað er ikki nakað nýtt fyri meg. Men orðaskiftið kann vera øgiliga hart og eisini persónligt. Men tá fólk ikki hava nøkur argument, so gerast tey persónlig. Tað má man bara vita. Ert tú nærtøkin, hevur tú ongan kjans.

*Lisbeth:* Eg minnist, hvussu hjartaleyst fólk tosaðu við meg, tá eg var barn, og eg segði hvør eg var. At enda svaraði eg ikki, tá tey spurdu meg, tí eg var so bangin fyri at hoyra okkurt niðrandi um pápa ella abba. Og tað hongur við. Eg havi verið ræðuliga kedd um, at míni nærmastu skuldu hoyra fyri okkurt, sum eg havi sagt ella gjørt.

*Annita:* Fyrsta tíðin eftir, at eg kom inn á ting, var eisini hørð. Knappliga byrja fólk at skriva hvassorðað lesarabrøv og niðurgera teg.

*Lisbeth:* Ofta er tað eisini órættvíst.

*Annita:* Ja, órættvíst! Men tú venur teg við tað eftir nøkrum árum. Tú kanst ikki blíva kelað ígjøgnum fleiri ár í politikki, tí um fólk bara halda, at tú ert fitt, so verður tú ikki afturvald.

*Lisbeth:* Tað er eisini sera ringt at liva við kompromissum. Men tey eru ein neyðugur partur av politikki.

*Hvussu tá tit hava søkt álitispostar, hava tit verið noyddar at arbeiða harðari enn menninir fyri at fáa somu sømdir?*

*Lisbeth:* Eg kom inn í Løgtingið í 1990, og tá fekk eg hart og týðiliga at vita, at "vit, sum hava sitið longst, velja fyrst", og so fekk eg tað, sum leyp av. Men tað er broytt nú.

Heidi: Eg haldi ikki, at nakar mismunur var hjá okkum. Øll førdu síni ynski fram, og so varð býtt. Eg haldi ikki, at tað var munur á, hvat kvinnur og menn fingu. Eg fekk í øllum førum tað, sum eg ynskti mær.

*Annita:* Tá postar verða býttir út, er tað alles kamp mod alle. Ert tú lítillátin og eftirgevandi, fært tú einki. Tá er líkamikið, um tú ert maður ella kvinna.

*Lisbeth:* Fólk sum koma inn nú, eru tilvitað um, hvat tey vilja hava. Soleiðis var tað ikki fyrr. Eg hevði stóra virðing fyri teimum eldru, og eg gjørdi, sum teir søgdu. Men tað eri komin yvir, og í dag hevði eg tosað øðrvísi við teir.

*Annita:* Hjá okkum er tað ein sjálvfylgja at hava kvinnur við, eisini í landsstýrissessum o.t. Men eg vil pástanda, at tað vera dugnaligar kvinnur valdar. Tað er ikki uttan krøv, at álitispostar verða latnir.

## Stórur tørvur á kvinnum

*Er tað nakrantíð soleiðis, at tit hugsa: Her eru altso ov fáar kvinnur?*

Allar við ein munn: JA!!!

*Lisbeth:* Ofta, ofta.

*Annita:* Og tað mangla kvinnur í øllum